

*Elbilar skulu hava somu kraft og toppferð sum vanligir bilar við bensin- ella dieselmotorum*



*Stovnarin av Better Place, Shai Agassi*




*Á servicestøðum verður alt meira vanligt við at reklamera við prísum á bæði oljuproduktum og battaríum*

Tann lidni pakkin til brúkaran er enn í stoypiskeiðini. Arbeitt verður við at finna loysnir, sum skulu royndarkoyrast undir øllum hugsandi umstøðum, áðrenn elbilarnar koma á marknaðin, og battarístøðirnar verða settar upp.

Men endaliga málið við Better Place verkætlanini er, at fólk kunnu keypa sær ein elbil, sum hevur somu kraft og toppferð sum ein vanligur bilur. Bileigararnir vera síðan við í eini Better Place battarískipan, har teir koyra inn á teirra støðir at skifta battarí. Better Place eigur øll battaríni, so bileigarin nýtist ikki at gera íløgu í battaríir.

Tað verður skjótari at koyra inn á eina Better Place servicestøð at skifta battarí enn tað er at bunkra olju ella bensin á eini vanligari servicestøð. Eitt nýupploølt battarí kann koyra umleið 150 kilometrar, áðrenn neyðugt er at "bunkra" aftur.

Better Place støðirnar vera heilautomatiskar. Bilførarin koyrir inn á støðina og steðgar við skiftiautomatina, sum sjálv skiftir battaríið. Tað tóma battaríið verður tikið úr og eitt fult upploølt verður sett inn ístaðin. Hetta tekur minni enn tríggjar minuttir.

Eftir ætlan verða Better Place battarískiftstøðir settar upp í Danmark, í samstarvi við Dong Energy, í 2010, og í 2011 kunnu fyrstu elbilarnir í Projekt Better Place seljast í Danmark.

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Jane Pedersen frá Dong Energy í samrøðu við Bilradio á Rás2*

*Mynd: Finn Jakobsen*




*Dúgliga varð prátað eftir fyrilesturin í Norðurlandahúsinum*

*Mynd: Finn Jakobsen*